## Finnland eftir hæli

Í Finnlandi eru serfrøðingar á einum máli um, at tey búskaparligu útlitini fyri árið í ár eru stak vábalig. Metingar hjá stjórnini siga, at bruttotjóðarframleiðslan verður 3,7 prosent minni í ár enn í 2008. Sama meting sigur, at finska útflutningsvirðið fer at minka 10 prosent í ár. Útlitini á arbeiðsmarknaðinum eru eisini døpur. Roknað verður við, at arbeiðsloysið fer at veksa 7,5 prosent í ár og 8,8 prosent næsta ár. Serfrøðingar vænta ikki, at fíggjarligir bjargingarpakkar hjá stjórnini fara at gera stórvegis mun.



## Íslendingar selja gamalt

Tað lága virðið á íslendsku krónuni man vera ein orsøkin til, at íslendingar útflyta gamlar lastbilar sum ongantíð fyrr. Bkaðið Vísir skrivar, at útflutningurin av lastbilum og øðrum vinnuakførum er vaksin nógv í seinastuni, og at prísurin er tvífaldaður. Fyritøkan Jötunn Vélar keypir lastbilarnar og hini vinnuakførini frá bøndrum og byggifeløgum og selir tey av landinum. Størstu keyparalondini eru Irak, Libanon og Benin, men okkurt fer eisini til Evropa og Suðuramerika, skrivar Vísir.

# Noyddust at sleppa s

**Ísfiskatrolarin Grímur Kamban lá eini 50-60 stig, tá slagsíðan var størst í myrkrinum seinasta leygarkvøld. - Sjálvandi hevði eg sum skipari ikki loyst eitt skip, sum ikki var í forsvarligum standi, og eg hevði heldur ikki sett manningina í slíkan váða, sum vit komu í hendan dagin og náttina eftir, sigur skiparin, Benadikt Joensen**



*- Skipaeftirlitið hevur nýliga verið umborð á Grími Kamban, og eg hevði onga orsøk at halda, skipið ikki var í forsvarligum standi, sigur skiparin, Benadikt Joensen*

*Mynd: Jákup Durhuus*

**VANDAFERÐ**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg sum skipari og vit, sum eiga skipið, fingu eitt sindur ilt av greinini um hendingina, tá vit á seinasta túri fingu so nógvan sjógv inn á verksmiðjuna, at vit noyddust at lata sjógv fara niður í lastina og niður í maskinrúmið fyri at halda skipinum nøkulunda á rættkjøl.

Tað sigur skiparin á ísfiskatrolaranum, Grími Kamban, Benadikt Joensen í Vestmanna.

Reiðarin á Grími Kamban er Tummas Henriksen í Sørvági, men millum eigararnar eru eisini Benadikt og aðrir yvirmenn umborð.

- Í greinini um hendingina sigur skiparin á Tjaldrinum, Ellintur Abrahamsen, at skiparin umborð á Grími Kamban virkaði skilagóður og sinniligur hesa náttina, tá manningin var í ringum skørum eystur úr Fugloynni. Í somu grein sigur Ellintur, at hevði Grímur Kamban verið í betri standi, hevði tað, sum hendi, ikki verið hent.

Benadikt heldur, at her er ikki samanhangur í.

- Sjálvandi hevði eg sum skipari ikki loyst eitt skip, sum ikki var í forsvarligum standi, og eg hevði heldur ikki sett manningina í slíkan váða, sum vit komu í hendan dagin og náttina eftir.

Skiparin á Grími Kamban vísir á, at Skipaeftirlitið nýliga hevur verið umborð á skipinum, og at hann sum skipari tí onga orsøk hevði til at halda, at skipið ikki var í forsvarligum standi.

Hann sigur, at ymiskt er gjørt við skipið, síðan teir yvirtóku tað einaferð í fjør summar.

- Tá vit yvirtóku skipið høvdu vit klassan umborð. Ymiskt var, sum skuldi gerast, og tað hava vit roynt at gjørt so við og við. Fyri fáum mánaðum síðan var klassin umborð aftur og góðkendi skipið. Tá høvdu vit gjørt alt, sum klassin kravdi. Tí hava vit á ongan hátt verið til fiskiskap við skipi, sum ikki er í forsvarligum standi.

Hann vísir á, at tað vóru ymiskar samanfallandi umstøður sum gjørdu, at hann sjálvur og manning hansara umborð á ísfiskatrolaranum komu so illa fyri undir fiskiskapi.

### Hvat hendi?

Tað var seinasta fríggjamorgun, at Grímur Kamban, sum partrolar saman við Kalsevni, fekk trupulleikar við el-veitingini umborð, meðan teir vóru til fiskiskap einar 50 fjórðingar eystur úr Fugloynni. Hetta var um 9-tíðina um morgunin.

- Veðrið var hampiligt hendan morgunin. Meðan vit tógaðu, kom skipið í eina aldu og legði seg. Ljósmotorurin slóknaði, og vit høvdu onkran kortslutning. Vit mistu streymin og einastu ljós, sum virkaðu, vóru neyðljós og eitt nú WHF-urin.

Benadikt sigur, at teir riggaðu brandpumpuna til at hava tøka, um sjógvur skuldi komið inn á verksmiðjuna, nú teir lógu við ongum streymi. Brandpumpan gongur við diesel og er leys av el-veitingini umborð.

- Meðan vit soleiðis liggja, fáa vit sjógv inn á verksmiðjuna og royna at pumpa hann útaftur við brandpumpuni. Vit klára at halda skipinum lens, men sum tíðin gongur, gongur eisini motorurin til brandpumpuna heitur.

Sum morgunin líður, biðir Grímur Kamban Vaktar-og Bjargingartænastuna um hjálp, og haðani senda teir Tjaldrið út á leiðina.

- Tá Tjaldrið var hjá okkum um 16-tíðina, fingu vit eina lensipumpu umborð, og tá fingu vit aftur allan sjógvin útaftur. Um 17.40-tíðina kundi Tjaldrið byrja at sleipa, men nú var vorðið myrkt, umframt at líkindini vóru versnaði.

Benadikt sigur, at hóast roynt varð at sleipa Grím Kamban við hóvligari ferð, sást skjótt, at hetta ikki bar til.

- Tað gekk illa at halda skipinum lens. Kørini á dekkinum vóru farin at rósa. Træskott brotnaðu, og træspønir og annað, sum lá á dekkinum, typtu pumpuna. Vit royndu at reinsa pumpuna, so hon koyrdi aftur. Men so hvørt, sum umstøðurnar á verksmiðjuni versnaðu, gekk illa at sleppa niður á dekkið. Til endans kundu vit bara standa í leytaranum og halda pumpuni niður í sjógvin.

Skiparin sigur, at ógjørligt er at siga, hvussu sjógvur kom inn á verksmiðjuna, tá myrkrið legðist yvir skipið.

- Eg haldi, at sjógvur kom ymsastaðni, og vit fingu einki gjørt til tess at fyribyrgja hesum.

### Óvanligt stig

Hann vísir á, at sum kvøldið leið, gjørdist støðan umborð "kritisk", sum hann tekur til.

- Skipið lá í bakborðssíðu, og tá tað lá tyngst á síðuni, mundi tað liggja eini 50-60 stig.

Benadikt sigur, at tá ið ringast stóð til um midnáttarleitið leygarkvøldið, sóu teir ongan annan møguleika enn at sleppa sjógvinum á verksmiðjuni niður í lastina og maskinrúmið.

- Hetta gjørdi, at stabiliteturin hjá skipinum batnaði, og nú var ikki vandi fyri, at skipið koppaði. Hetta var avgjørt ein neyðloysn – og ein tann seinastu møguleikin, vit høvdu.

Skiparin heldur, at soleiðis sum líkindini vóru leygarkvøldið og út á náttina, hevði verið sera trupult at tikið fólkið av skipinum.

- Eg trúgvi, at frægasti møguleikin hevði verið at farið í bjargingarbátin. Kanska hevði eisini borið

